

*Atli P. Dam við modellinum av Steintóri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Atli við modelli av Steintóri

**SØGA** Nú vit hava gjørt nakað burtur úr hvalbiartrolarunum, Niels Paula og Steintóri, sum fara at partrola eftir upsa, hildu vit, at henda lítla søgan kann takast við í samanhangin

Vilmund Jacobsen

Tá Sosialurin í morgun tosaði við Jákup Paula Hammer, skipara á Steintóri, kom prátið inn á Langstein skipasmiðjuna í Noregi, sum hevur smíðað nógv skip til Føroya, eitt nú báðar hvalbiartrolararnar, Niels Paula og Steintór.

Nógv onnur føroysk skip eru eisini smíðað á hesi skipasmiðju, sum kanska hevur smíðað nakrar kilometrar av skipum til Føroya tilsamans.

Meðan vit prátaðu um Steintór, nevndi undirritaði, at eg var við í Noregi, tá uppisjóvarskipið, Finnur Fríði, varð navngivin á somu skipasmiðju.

Knappliga sigur Jákup Pauli Hammer, at júst tá fekk Atli P. Dam, fyrrverandi løgmaður og stjóri í Realinum gjøgnum mong ár, handað eitt modell av Steintóri.

- Eg havi skilt, at hetta var ein privat gáva til Atla, men at modellið stendur á Realinum, segði skiparin.

Undirritaði var eisini við í Noregi, tá Finnur Fríði varð navngivin, og tá Jákup Pauli Hammer nevndi Atla P. Dam og modellið av Steintóri, kom mær til hugs, at eg júst hevði tikið eina mynd av Atla saman við modellinum, tá hátíðarløta var í Noregi eftir, at Finnur Fríði var navngivin.

Og her er so myndin, Atli P. Dam, fyrrverandi løgmaður og stjóri í Realinum í mong ár, við modellinum av Steintóri.

*vilmund@sosialurin.fo*



# Steintór fara at p

**ORKUSPARING** – Tá loyst verður aftur, fara vit at partrola, og vit ætla okkum í fyrsta lagi at gera hesa royndina í vár. Tá Steintór í summar var á gulllaksaveiði saman við Vesturbúgvanum, spardu vit umleið 40% í oljuútreiðslum. Vit vænta, at sparingin verður ikki minni, nú Steintór og Niels Pauli fara at partrola eftir upsa, sigur Jákup Pauli Hammer, sum hevur ført Steintór í samfull 22 ár

Vilmund Jacobsen

Jákup Pauli Hammer í Hvalba er ein av eigarunum av felagnum P/F Steintór, sum eigur djúpvatnstrolaran við sama navni. Hann er eisini útgerðarmaður hjá skipinum. Steintór kom til Føroya tollaksmessudag í 1985, og tvey ár frammanundan kom systirskipið – Niels Pauli – eisini tollaksmessudag í 1983.

Seinastu 22 árini hevur hann ført Steintór.

- Eg var við í Noregi eftir skipinum. Tey allar fyrstu árini var eg stýrimaður og avloysari sum skipari, men síðan eg fór at føra skipið, havi eg verið skipari øll árini fram til dagin í dag, sigur hann.

**Steintór bestur**

Jákup Pauli letur ikki illa at gongdini hesi árini.

- Sjálvandi hava ár verið misjøvn, men vit kunnu ikki lata illa at. Gongdin hevur